Internetið verður íbundið í dag

Sosialurin út í 50 milliónum eintøkum í dag:

Fyrsta føroyska blaðið á internetinum


Sosialurin kemur í dag sum fyrsta føroyska blaðið á Internetinum
Sosialurin verður í dag sum hitt fyrsta føroyska blaðið heimsumfatandi, nú allir teir 50 milliónir internetbrúkararnir í heiminum fáa høvi at siggja Sosialin á internetinum.
Tað merkir, at ein og hvør, sum hevur eina teldu og sum er íbundin internetið - hvar enn í heiminum hann er, kann lesa tilfar úr Sosialinum - tað veri seg í Avstralia, Grønlandi ella í Kina. Ætlanin er í fystu syftu, at internetútgávan av Sosialinum verður dagførd eina ferð um vikuna.
Ein internetútgáva av einum dagblað er ikki átøk dagligu pappírsútgávuni. Onnur bløð úti í heimi hava roynt hetta eina tíð, og vísir tað seg at vera sera væl umtókt millum internetbrúkarar. Røddir vóru frammi, sum hildu, at hetta fór at vera ein hóttan móti vanligu pappírsútgávuni av blaðnum, men so vísti seg ikki at vera.
Sambindingarliðini lætta munandi um
Sosialurin hevur sæð fleiri fyrimunir við at víðka útgávuna til eisini at umfata internetið. Til ber at hava nógv av tilfarinum á netinum í senn - og lætt er at gera nýtslu av teimum sokallaðu »hyperlinks« ella sambindingarliðum. Hesir gera tað møguligt at loypa frá einum teksti til annan uttan trupulleikar. Um tú lesur eina grein um ávíst evni, er møguligt við sambindingarliðunum at finna aðrar greinar um sama evni.
Nú Sosialurin kemur við síni heimsumfatandi internetútgávu, ber til hjá fólki um allan heim at lesa internetútgávuna so skjótt tilfarið er lagt inn á internetið. Til ber eitt nú at tekna seg sum haldara av pappírsútgávuni av blaðnum gjøgnum internetið og skjótt fer eisini at bera til at senda eitt nú greinar og lesarabrøv gjøgnum netið til blaðið.
Óli P heimsgitin
Skemtiteknarin á Sosialinum nógvu tey seinastu árini, Óli Petersen verður eisini at siggja á netinum við tekningunum. Á henda hátt fara tekningar hansara ikki bara at stuttleika føroyingum - men øllum kring heimin, sum á netinum leggja leiðina fram við heimasíðuni hjá Faroe News, sum umsitur internetútgávuna av blaðnum.
Faroe News - ein internetfyritøka
Faroe News er ein fyritøka, sum umsitur heimasíður og lýsingar á internetinum. Hetta verður gjørt soleiðis, at virki, fyritøkur og stovnar hava møguleika at leiga lýsingarteigar ella heimasíður frá Faroe News, og á henda hátt gera vart við seg um allan heimin. Í hesum sambandi átekur Faroe News sær eisini at framleiða lýsingar og heimasíður á netinum.
World Wide Web
Internetútgávan av Sosialinum liggur á eini sokallaðari WWW heimasíðu. WWW stendur fyri World Wide Web, og sum navnið sigur, er hetta eitt heimsumfatandi »spinnivev«. Hugskotið aftan fyri WWW er, at tað ikki er neyðugt at lesa tekstir eins og í einum vanligum blað, t. v. s. síður fyri síðu. Møguleiki er, sum áður nevnt, at loypa tekst av teksti við sambindingarliðunum. Á henda hátt kanst tú á ferð í »spinnivevinum« skiótt skifta bæði evni og heimasíðu.
Seinastu árini er nógv hent innan WWW. Frá einans at verða tekstsíður, er nú eisini møguleiki at saman tvinna bæði myndir, ljóð og tekstir. Hetta hevur við sær, at einans hugflogið hjá heimasíðuútbjóðarunum og ferðin á »modeminum« hjá brúkaranum setur mark fyri, hvussu áhugaverd ein ferð á netinum kann gerast.
Týdningarmikil fjølmiðil
Tað er einki at ivast í, at internetið verður ein sera týdningarmikil fjølmiðil í framtíðini. Tí ræður um hjá okkum føroyingum eisini at vera við.
Tað eru nógvir ymiskir áhugabólkar, sum gera nýtslu av netinum. Í Síðstu viku vísti TV3 eina sending um, hvussu nýnazistarnir gera sær dælt av hesum nýggja miðli, sum trupul er at sensurera. Vit kunnu bara ímynda okkum, hvussu verður, um eitt nú ymsu sokallaðu umhvørvisfelagsskapirnir, sum plaga at leggja okkum føroyingum fordingar í vegin, fáa fótin fyri seg innan henda miðil.
Tí ræður um hjá okkum føroyingum at gera nýtslu av hesum miðli - eisini í striðnum í grindamálinum. Sosialurin leggur nú til bróts - og gongur væl, er ætlanin eisini at umseta tilfar til onnur mál.

Δ

Myndin sýnir, hvussu ein heimasíða fer at síggja út. Tá blaðið fór til prentingar, var síðin ikki endaliga liðug. Hon skuldi verða liðug á miðnátt í gjárkvøldið.

Í dag ber til hjá 50 milliónum internetbrúkarum kring allan heimin at lesa tíðindi í Sosialinum á netinum. Hetta er gjørligt, nú Sosialurin - sum fyrsta føroyska blaðið - er farið undir eina digital-ávís - eitt føroyskt blað á internetinum.

EIRIKUR LINDENSKOV

Sosialurin verður í dag sum hitt fyrsta føroyska blaðið heimsumfatandi, nú allir teir 50 milliónir internetbrúkararnir í heiminum fáa høvi at siggja Sosialin á internetinum.

Tað merkir, at ein og hvør, sum hevur eina teldu og sum er íbundin internetið - hvar enn í heiminum hann er, kann lesa tilfar úr Sosialinum - tað veri seg í Avstralia, Grønlandi ella í Kina. Ætlanin er í fystu syftu, at internetútgávan av Sosialinum verður dagførd eina ferð um vikuna.

Ein internetútgáva av einum dagblað er ikki átøk dagligu pappírsútgávuni. Onnur bløð úti í heimi hava roynt hetta eina tíð, og vísir tað seg at vera sera væl umtókt millum internetbrúkarar. Røddir vóru frammi, sum hildu, at hetta fór at vera ein hóttan móti vanligu pappírsútgávuni av blaðnum, men so vísti seg ikki at vera.

Sambindingarliðini lætta munandi um

Sosialurin hevur sæð fleiri fyrimunir við at víðka útgávuna til eisini at umfata internetið. Til ber at hava nógv av tilfarinum á netinum í senn - og lætt er at gera nýtslu av teimum sokallaðu »hyperlinks« ella sambindingarliðum. Hesir gera tað møguligt at loypa frá einum teksti til annan uttan trupulleikar. Um tú lesur eina grein um ávíst evni, er møguligt við sambindingarliðunum at finna aðrar greinar um sama evni.

Nú Sosialurin kemur við síni heimsumfatandi internetútgávu, ber til hjá fólki um allan heim at lesa internetútgávuna so skjott tilfarið er lagt inn á internetið. Til ber eitt nú at tekna seg sum haldara av pappírsútgávuni av blaðnum gjøgnum internetið og skjótt fer eisini at bera til at senda eitt nú greinar og lesarabrøv gjøgnum netið til blaðið.

Óli P heimsgitin

Skemtiteknarin á Sosialinum nógvu tey seinastu árini, Óli Petersen verður eisini at siggja á netinum við tekningunum. Á henda hátt fara tekningar hansara ikki bara at stuttleika føroyingum - men øllum kring heimin, sum á netinum leggja leiðina fram við heimasíðuni hjá Faroe News, sum umsitur internetútgávuna av blaðnum.

Faroe News - ein internetfyritøka

Faroe News er ein fyritøka, sum umsitur heimasíður og lýsingar á internetinum. Hetta verður gjørt soleiðis, at virki, fyritøkur og stovnar hava møguleika at leiga lýsingarteigar ella heimasíður frá Faroe News, og á henda hátt gera vart við seg um allan heimin. Í hesum sambandi átekur Faroe News sær eisini at framleiða lýsingar og heimasíður á netinum.

World Wide Web

Internetútgávan av Sosialinum liggur á eini sokallaðari WWW heimasíðu. WWW stendur fyri World Wide Web, og sum navnið sigur, er hetta eitt heimsumfatandi »spinnivev«. Hugskotið aftan fyri WWW er, at tað ikki er neyðugt at lesa tekstir eins og í einum vanligum blað, t. v. s. síður fyri síðu. Møguleiki er, sum áður nevnt, at loypa tekst av teksti við sambindingarliðunum. Á henda hátt kanst tú á ferð í »spinnivevinum« skiótt skifta bæði evni og heimasíðu.

Seinastu árini er nógv hent innan WWW. Frá einans at verða tekstsíður, er nú eisini møguleiki at saman tvinna bæði myndir, ljóð og tekstir. Hetta hevur við sær, at einans hugflogið hjá heimasíðuútbjóðarunum og ferðin á »modeminum« hjá brúkaranum setur mark fyri, hvussu áhugaverd ein ferð á netinum kann gerast.

Týdningarmikil fjølmiðil

Tað er einki at ivast í, at internetið verður ein sera týdningarmikil fjølmiðil í framtíðini. Tí ræður um hjá okkum føroyingum eisini at vera við.

Tað eru nógvir ymiskir áhugabólkar, sum gera nýtslu av netinum. Í Síðstu viku vísti TV3 eina sending um, hvussu nýnazistarnir gera sær dælt av hesum nýggja miðli, sum trupul er at sensurera. Vit kunnu bara ímynda okkum, hvussu verður, um eitt nú ymsu sokallaðu umhvørvisfelagsskapirnir, sum plaga at leggja okkum føroyingum fordingar í vegin, fáa fótin fyri seg innan henda miðil.

Tí ræður um hjá okkum føroyingum at gera nýtslu av hesum miðli - eisini í striðnum í grindamálinum. Sosialurin leggur nú til bróts - og gongur væl, er ætlanin eisini at umseta tilfar til onnur mál.

Δ